# Sambandsflokkurin ger sjálvmál

**Við at velja Kaj Leo sum eftirmann fyri Bárð hevur Sambandsflokkurin bjargað Javnaðarflokkinum ein nýggjan tingmann, tí Heðin Mortensen er næstur á listanum hjá Sambandsflokkinum. Síðani tá hevur borgarstjórin, og nú nýggi tingmaðurin í Havn, skift til Javnaðarflokkin**

POLITIKKUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Tað verður javnan sagt, at alt kann henda í politikki, og tað ber sanniliga til at brúka í hesum føri. At Bárður Nielsen leggur frá sær, og Kaj Leo Johannesen tekur við, merkir samstundis, at Sambandsflokkurin má lata ein tingsess til Javnaðarflokkin. Hetta kemst av, at Heðin Mortensen, ið er næsti maður á Sambandslistanum í Suðurstreymi, síðani seinasta løgtingsval hevur skift til Javnaðarflokkin.

Hetta hendi eftir seinasta býráðsval, tá Heðin Mortensen varð blakaður úr flokkinum, tí Heðin Mortensen fekk boðið borgarstjórasessin við at fara í samgongu við Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin. Hetta bleiv restin av býráðsumboðanini hjá Sambandsflokkinum og leiðalan í flokkinum so fortørnað inná, at Heðin Mortensen varð blakaður úr flokkinum. Dagin var hann limur í Javnaðarflokkinum.

Í lagnunar speisemi ber tí til at gera ta niðurstøða, at tveir sambandsmálmenn – Kaj Leo, sum er fyrrverandi málmáður í HB, og Bárður hjá VÍF – í felag hava gjørt eitt rættiliga stórt sjálvmál.

Í morgun hevði Sambandsflokkurin átta tingfólk og Javnaðarflokkurin átta. Nú er støðan 8-6 til Javnaðarflokkin, tí Heðin Mortensen hevur gjørt av at taka við løgtingssessinum.



*Eitt av stóru sjálvmálunum í føroyskum politikki hendi í dag, tá Kaj Leo Johannesen gjørdi av at taka við landsstýrissessinum sum avloysari fyri Bárð Nielsen. Hetta merkir, at Heðin Mortensen kemur á ting ..... ikki fyri Sambandsflokkin, men fyri Javnaðarlflokkin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Løgmaður:

# Stórur missur fyri samgonguna

**Jóannes Eidesgaard sigur seg harmast um, at Báður Nielsen tekur seg úr landsstýrinum. Hinvegin sigur hann seg sum løgmann vera noyddan at virða avgerðina**

POLITIKKUR
*karim@sosialurin.fo*

- Sjálvt um orðatakið sigur, at maður kemur í mans stað, so harmar tað meg, at Bárður Nielsen leggur frá sær. Hinvegin má eg sum løgmaður virða avgerð hansara og ynskja honum góða eydnu við nýggja starvinum

Hetta sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður. Hann heldur, at Bárður Nielsen hevur verið ein fongur fyri Landsstýrið og samgonguna, tí hann er sera dugnaligur og samvitskufullur.

- At privata vinnulívið nú er eftir honum, prógvar hansara evnir, sigur Jóannes Eidesgaard.

Sum løgmaður ætlar hann sær ikki at leggja út í, hvør eftirmaðurin verður.

- Eg havi fult álit á, at Sambandsflokkurin finnur rætta persónin, sigur Jóannes Eidesgaard.

*Hevur tú sett nøkur krøv til, hvør tað skal vera?*

- Nei, tað havi eg ikki. Leiðslan í flokkinum veit, hvat skal til, sigur løgmaður.

*Tað vistu leiðslan eftir øllum at døma ikki fyri góðum trimum árum síðani, tá Jóhan Dahl varð settur sum fiskimálaráðharri, og tú longu 20 dagar seinni koyrdi hann úr starvi. Um flokkurin nú skýtur hann upp sum eftirmann hjá Bárði Nielsen, hvat sigur tú so?*

- Eg fari ikki at viðgera eitt uppskot, sum ikki er eitt uppskot, sigur Jóannes Eidesgaard.

*Fert tú at góðtaka Jóhan Dahl sum landsstýrismann?*

- Sum áðurnevnt kann eg ikki fyrihalda meg til eitt uppskot, sum er har.

*Hvussu nógvar dagar fær Sambandsflokkurin til at finna eftirmannin?*

- Eg kann ikki áseta nakað dagatal, men eg gangi út frá, at flokkurin rættiliga skjótt finnur út av hesum.

*Væntar tú at fáa eitt navn í dag?*

- Nei, men rættiliga skjótt, sigur Jóannes Eidesgaard, sum í løtuni er staddur í London.

# Umsøkjarar til Stórutjørn vrakaðir

**40 umsóknir vóru til stjórastarvið við Stórutjørn. Men sjálvt um felagið aftanfyri ætlanina fyrst í vikuni meldaði út, at øll vóru skikkaði til starvið, hevur felagið kortini valt at »headhunta« ein landsstýrismann til at standa á odda fyri ætlanini**

STARVSSETAN
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Stórur áhugaði hevur verið fyri stjórastarvinum í felagnum, ið stendur aftanfyri størstu byggiætlanina í Føroyum nakrantíð. Men sjálvt um felagið meldaði út, at allir 40 umsøkjararnir vóru skikkaðir til starvið, so hevur felagið kortini verið úti og headhuntað ein landsstýrismann til starvið.

Tað eydnaðist ikki at fáa nakra viðmerking frá felagnum hjá Jákupi á Dul Jacobsen, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Heðin skal spyrja býráðið

**Tað ber til hjá Heðini Mortensen at vera borgarstjóri í Havn og løgtingslimur. Men so skal býráðið geva serstakt loyvi til hetta**

POLITIKKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í útgangsstøðinum skal ein borgarstjóri, sum er fulltíðarsettur, leggja annað borgarligt starv niður. Kommunustýrislógvin heimilar tó, at frávik verður gjørt, um talan er um starv, sum er beinleiðis fólkavalt.

Grein 6, stk. 2 í Kommunustýrislógini er soljóðandi:

» Val av borgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið. Borgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. Setanarbrøkur borgarstjórans verður ásettur í kommunustýrisskipanini til antin 1/2 ella 1/1. Um setanarbrøkurin er 1/1, skal borgarstjórin, tá ið hann er valdur, leggja borgarliga starvið frá sær umframt øll almenn álitisstørv, sum ikki beinleiðis hava samband við starvið sum borgarstjóri. Kommunustýrið kann loyva frávik frá regluni í 4. pkt, tá ið umrædur størv sum eru beinleiðis fólkavald.«

Soleiðis kann Heðin Mortensen átaka sær tingsessin, sum nú stendur leysur, samstundis sum hann røkir borgarstjóraembætið. Men so skal hann fáa loyvi til hetta frá einum meiriluta av býráðnum í høvuðsstaðnum.